

*Intensitetur var langt í frá tí vanliga, tá Kyndil og VÍF sunnudagin gjørdu av, hvør teirra skuldi vinna møguliga fyrimunin av heimavølli*
Mynd: Álvur Haraldsen

Kyndil-VB 26-32 (10-16):

# VB tók bronsuna

**Daiva Toumaite skeyt 16 mál, tá VB í sínum seinasta dysti vissaði sær bronsukrónurnar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir trygga sigurin hjá VB í fyrra bronsudystinum var ivamálið um bronsuna ikki tað stóra. Tað merkti eisini dystin nakað, at liðini ikki høvdu hug at skrúva intensitetin alt ov nógv upp, og fyrstu longu løtuna gekk eisini rættilgia javnt á. steðginum fekk VB tó av álvara ferð á, og munurin, sum tá íkom, gjørdist eisini avgerandi fyri seinnu uppgerðina.

Sum ikki einaferð, so staðfesti Daiva Toumaite óhugnaliga týdningin, sum hon hevur fyri VB-liðið. Hesa ferð skeyt langlimaði litavin 16 av málunum hjá VB, og undirstrikaði hon soleiðis enn einaferð, at tað fyrst og fremst er hon, sum hevur meistarunum á á eini hampuliga beinari kós hetta kappingarárið.

## FAKTA

**Kyndil-VB 26-32 (10-16)**

(VB bronsuvinnari við samanlagt 62-48)

**Málskjúttar**
**Kyndil:** Jórun Ludvig 7(3), Linda Weihe 5, Súsanna Petersen 4, Lina Adriulyte 3, Barbara Egilstrøð 2, Aja Heinadóttir 2, Randi S. Wardum 2, Hildur Høghamar 1
**VB:** Daiva Toumaite 16(6), Svava Vestergaard 5, Gurið Mortensen 4, Christina Holm 4, Ma±rgreth Augustinussen 2, Annika Thomsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 6, VB 6
**Útvísingar:** Kyndil 3, VB 3
**Dómarar:** Heri Petersen & Dánjal Samuelsen

Kyndil-VÍF 27-29 (10-13):

# VÍF vann endaspælið

**Hóast heimavøllurin í eini møguligari triðu finalu stóð upp á spæl, so tóku bæði VÍF og Kyndil øll hugsandi fyrilit, tá seinasti dysturin í endaspælinum varð á skránni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað verður VÍF, sum fær møguliga fyrimunin av heimavølli í eini triðu finalu um FM-heitið í manshondbólti.

Tað var sum so einasta niðurstøðan av dystinum á Hálsi sunnudagin, tá Kyndil og VÍF spældu eina óvanliga tama útgávu av stóra klassikaranum í føroyskum manshondbólti.

### Stuðlar restaðu

Hjá báðum pørtum var galdandi, at onkrir týðandi spælarar ikki vóru við til dystin hesaferð. Antin tí teir vóru burturstaddir, ella tí venjararnir ikki vildi seta nakað sum helst í vága undan teimum so sera týdningarmiklu finalunum.

Hjá Kyndli merkti tað verjuna sera hart, at hvørki Hans Áki Dal-Christiansen ella Marius Joensen vóru tøkir til dystin. Júst teir báðir eru í mangar mátar bylgjubrótarar í verjuspælinum hjá Kyndli, og móti skotsterku vestmenningunum var tað nærum lívshættisligt. Ikki minst tí Regin Joensen tóktist hava stillað kanónina heilt væl, tá Kyndil av álvara royndi at ansa Sámali Joensen.

Í so máta bilti tað kanska minni, at Harald Bjørgvin og Áki Olsen sótu uttan fyri hjá VÍF. Ikki tí. Báðir hava í mangar mátar átikið sær sera týðandi leiklutir í álopsspælinum hjá VÍF, men soleiðis sum dysturin tók skap, so var frávera teirra ikki heilt so týðandi, sum tann hjá Kyndli tóktist at vera. Og so skert ikki burtur, at við at hava Martin Hummeland aftur á liðnum, hevur VÍF fingið enn eitt vápn til kantspælið.

### Gjørdu sær ikki dælt

Móti dystarenda var tó um reppið, at veruligur spenningur kortini kom í dystin. Kyndil hevði togað seg somikið nær, at bert eitt mál skilti partarnar, tá VÍF fekk eina útvísing.

Í yvirtali megnaðu teir grønu tó ikki at umseta fyrimunin til mál, og tá Sámal so høgdi bóltin í kassa fyri VÍF, var alt mest sum avgjørt. Tann skoringin var kanska júst hon, sum avgjørdi, hvar seinasta finalan skal spæla, um komið verður fram til eina slíka.

### Ivasamur fyrimunur

Meira enn nakað, so tóktist tað eftir dystin ivasamt, hvussu stórur fyrimunurin av møguliga heimavøllinum í triðja dystinum er.

Í Útvarpinum høvdu venjararnir hjá báðum liðum á lofti, at dysturin hesa ferð meira enn nakað tænti sum fyrireikan til finaludystirnar. Og at hvørgin teirra tí vildi vága tað heilt stóra.

Tað setti so eisini sín dám á dystin, ið als ikki hevði tann intensitet, sum hesir oftast hava. Men tann parturin man væl og virðiliga vera broytur, tá farið verður undir fyrsta finaludystin komandi sunnudag. Í fyrsta umfari verður talan tá um tvey verulig brak, og so fæst at vita, hvørt tað triða av slagnum eisini er væntandi.

## FAKTA

**Kyndil-VÍF 27-29 (10-13)**

**Málskjúttar**
**Kyndil:** Høgni Klein 10(2), Rókur Akralíð 9, Ragnar Stakksund 3, Janus Einar Sørensen 2(1), Hjalti M. Jacobsen 2, Josef Abrahamsen 1
**VÍF:** Regin Joensen 8(2), Sámal Joensen 7, Agnar Joensen 6, Áki G. Olsen 4, Martin Hummeland 1, Sjúrður Poulsen 1
**Brotskøst:** Kyndil 4, VÍF 2
**Útvísingar:** Kyndil 1, VÍF 4
**Dómarar:** Hallur Danielsen & Petur Skeel Dahl.

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**
**MENN**

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 10 | 8 - 1 - 1 | 555 | 514 | 41 | 23 |
| 2 | Kyndil | 10 | 6 - 1 - 3 | 539 | 478 | 61 | 21 |
| 3 | H71 | 10 | 6 - 0 - 4 | 534 | 476 | 58 | 20 |
| 4 | StÍF | 10 | 5 - 0 - 5 | 504 | 511 | -7 | 16 |
| 5 | KÍF | 10 | 4 - 0 - 6 | 498 | 530 | -32 | 10 |
| 6 | Neistin | 10 | 0 - 0 - 10 | 508 | 629 | -121 | 1 |

# H71 vann seinasta dystin

**Hoyvíkingarnir tóku seinasta stikkið á Skála, har heimaliðið var merkt av fótbóltinum, sum nú er byrjaður**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Endaliga plaseringin av bronsukrónunum var mest sum avgjørd, longu áðrenn farið varð undir dystin á Skála. Og tí var eisini ivasamt, hvussu nógv liðini løgdu í dystin leygardagin. Eitt nú hevði StÍF ongan av teimum við, tað viknaði sjálvandi nógv um liðið.

Tað vóru eisini hoyvíkingarnir, sum struku avstað við sigrinum, soleiðis at teir – hóast alt – kundu enda kappingarárið við tveimum sigrum, eftir at møguleikin fyri FM-finaluni varð tveittur burtur við fleiri tapum á rað seinna partin av endaspælinum.

Leygardagin løgdu gestirnir seg skjótt á odda, og í veruleikanum vóru strandingarnir ongan tíð nær námind sigrinum. Móti dystarenda minkaðu teir nakað um munin, men nærri enn tvey mál komu teir ongantíð.

## FAKTA

**StÍF-H71 29-33 (9-15)**

**Málskjúttar**
**StÍF:** Sveinur Justinussen 11, Leivur Justinussen 7(4), Jón Rasmussen 3, Alexandur Johansen 3, Bent Djurhuus 2, Borgar Danielsen 2, Artur Johansen 1
**H71:** Johnny Durhuus 14(6), Sigtór Andreasen 6, Piti Negru 5, Bjarni Sørensen 4, Niels Viggo Niclassen 4
**Brotskøst:** StÍF 5, H71 6
**Útvísingar:** StÍF 2, H71 5
**Dómarar:** Kristian Johansen & Sámal Paulason